

## Frá astma-spreyi til tónleik

Simon Jaymes vaks upp í East Sussex í Onglandi. Sum ungur sang hann í kór og íðkaði bardaga ítrótt. Astma-spreyið var tó ongantíð langt burtur. Sum 16 ára gamal fekk hann av álvara áhuga fyri tónleiki, og nú telist hann millum teir virdu singer/songwriters í tónleikaumhvørvinum í London. Simon Jaymes vitjar Rás2 og spælir live.



## Føroyski sniðgevin í London

Føroyski sniðgevin Elisa Heinesen hevur seinnu árini búð og virkað í London. Síðani 200 hevur arbeitt við at skapa klæði, sum hon hevur sýnt fram í Europa, USA og í Fjareystri. Vit hitta Elisu til eitt prát um móta, um at vinna fram uttanlands og um heimlongsul.



## Hvat ger Heidi?

Hon er kend sum eitt av okkara fremstu ítróttarfólkum. Hon hevur tikið lut í altjóða svimjikappingum og vunnið gull og onnur heiðursmerki. Nú býr Heidi Andreasen í London. Vit uppklára, hvat hon tekst við har, og hvussu tað er við svimjingini.



## Burðardygg fiskivinna

Kjartan Hoydal hevur dagligu leiðsluna av felagsskapinum NEAFC. Hann arbeiðir í London og hevur eisini fylgt gongdini í málinum um føroysku hýsuna, sum er útihýst frá bretska marknaðinum. Vit tosa við Kjartan Hoydal um fiskiskap, fiskidagaskipan og burðadygga veiðu.



## Flogferð burturlutað

Rás2 og Atlantsflog burturluta í sambandi við sendingarnar úr London eina flogferð til enska høvuðsstaðin. Fylg við í sendingunum gjøgnum vikuna og ver við í kappingini.

## Abbin hjálpti henni at keypa gittar



Sum 14 ára gomul hevði Emma Tricca gott eygað á gittaranum hjá systkinabarni sínum, sum hann hevði fingið í føðingardagsgávu. Men hann vildi ikki læna henni gittaran, hóast hann ikki brúkti gittaran. Tá ið hon fylti 16 ár gav abbi hennara henni pengar, so hon kundi keypa gittaran frá systkinabarninum. Síðani hevur hon vunnið fram sum fólkatónleikari. Hon hevur verið á konsertferð í Bretlandi og aðrastaðni í Europa, og hesa vikuna fer hon at spæla live á Rás2.

## Cap Dan í Heathrow



Hann starvast millum mongu flogførini í Heathrow floghavnini og hevur búð í enska høvuðstaðnum í fleiri ár. Dánjal Rein greiðir frá, hvussu arbeiðslagið er á einum av heimsins størstu flogvøllum, og hvussu tað er at hava føroyskan samleika í einum av heimsins størstu metropolum.



## Streets of London

Rás2 hevur studio á føroysku Sendistovuni í London, men vit fara eisini út á gøtuna við mikrofonini at gera reportasjur og snodda til lívið í enska stórbýnum.

## Í songini hjá Ahmadinejad

Á ferðini til London hevur Rás2 vitjað dýrasta og størsta rúmið á Hotel Hilton. 160 fermetrar av marglæti til 18000 krónur um døgnið. Vit práta yvir songina, har Bil Gates, iranski forsetin, ST-aðalskrivarin og onnur góð fólk hava sovið.





## Far ikki til Klaksvíkar

Hvussu ber tað til, at ein kanadiskur singer/songwriter hevur skrivað ein sang, sum hann kallar Don't Go To Klaksvik. Vit práta við Leif Vollebekk og fáa søguna um sangin, sum hevur sín uppruna í eini heldur øðrvísi ferð í Føroyum – og einum kiksaðum túri til Klaksvíkar.

**RÁS2 ÚR LONDON**

Týsdagin ..........9-12 & 15-17
Mikudagin .......9-12 & 15-17
Hósdagin .........9-12 & 15-17
Fríggjadagin.....9-12